


*Nýggja framleiðsluhúsið í Stóru Dímun er einasta av sínum slagi. Óhugsandi er ikki, at onnur slíkt verða bygd á øðrum útoyggjum. Óla Jákup úr Dímun kann fegnast um at fyrstu krovini eru komin upp at hanga*

*Mynd: storadimun.fo*

# Fyrsta av sínum slagi

**SLÁTUR** Eftir at framleiðsluvirkið í Stóru Dímun fekk løggilding sum slíkt, hevur nógv virksemi verið her. Hetta er samstundis einasta virkið ið er løggildað til slátur

Snorri Brend

**Stóra Dímun:** Í hesum døgum kunnu dímunarfólk fegnast um, at ein stór og torfør verkætlan er komin undir land:

Fyrsta framleiðsluhúsið á útoyggj, við eini slátureind og eini eind at garva skinn í, er nú vorðið veruleiki.

8. september varð nevniliga slátureindin løggildað, og nú kann kjøt og annar útdráttur úr Stóru Dímun seljast til handlar, matstovur og onnur uttan trupulleikar.

Fyrsta fylgið varð flett 20. september, og sum skilst riggaði tað sum tað skuldi.

### Tað fyrsta

Tað er kortini ikki bert á Stóru Dímun at fólk fegnast um hetta framstigið. Eisini tey í Útoyggjafelagnum gera tað sama.

– Ja, tað kann sigast at vera ein sjáldsom støða, at einasta virki í Føroyum, ið er løggildað til slátur, liggur á landsins minstu oyggj.

– Men hetta ber eisini boð um, at á útoyggj eru kreftir, ið ynskja og vilja framburð, verður sagt úr Útoyggjafelagnum.

> **Tað kann sigast at vera ein sjáldsom støða, at einasta virki í Føroyum, ið er løggildað til slátur, liggur á landsins minstu oyggj**

Seinastu trý árini er nærum øll orkan hjá dímuningum løgd í arbeiðið við framleiðsluhúsinum. Arbeiðið hevur haraftrat verið merkt av treiskni, tolsemi og áhaldni.

– Uttan hetta, var ikki komið á mál, tí tað hava verið nógvir snávingarsteinar á vegnum, bæði við at fáa tilfar og arbeiðsorku til oynna, umframt tær fíggjarligu avbjóðingarnar, ið hava verið, staðfestir Útoyggjafelagið.

Víst verður á, at nú er slóðað fyri, at framleiðsluhús kunnu koma á allar útoyggjarnar. Dømi um slík støð er Fugloy, Skúvoy og aðrastaðni við.

*snorri@sosialurin.fo*